TING-HELLAN

# netinum…




Mong munnu enn minnast Zip-episoduna í summar, tá ið tað varð avdúkað, at kjakið í stóran mun varð nýtt til at hanga ávísar persónar út, ið ongan møguleika høvdu at verja seg. Tó er tað í ávísan mun gjørligt hjá einum dugnaligum kjakansara at finna fram til tey seku og harvið at nokta teimum atgongd til kjakforumið.

**www.faroenet.fo** Tá man skal viðgera føroysk kjakforum, er ringt at sleppa uttanum Faroenet. Faroenet er mær vitandi elsta føroyska kjakforum, ið enn er á lívi. Tað hevur verið eitt tað mest vitjaða kjakforumið, og er tað framvegis. Ein tann størsti trupulleikin við hesum kjakforumi er, at tað er illa stýrt. Hóast til ber at skráseta seg sum kjakara, eru tað fá, ið gera tað, og hetta merkir, at kjakstøðið á Faroenet sjáldan verður serliga høgt.

**www.kvinna.fo** Heimasíðan hjá "Kvinnu" hevur tað higartil nýggjasta skotið á føroyska kjakmarknaðinum. Kjakið er serliga ætlað kvinnum (harav navnið), men har konufólk eru, er skjótt at eisini mannfólk rekast. Kvinna.fo er serstakliga væl vitjað. Síðani ljósareyða heimasíðan varð løgd á alnótina, hevur hetta kjakið verið tað mest vitjaða yvirhøvur. Kjakið á kvinna.fo er býtt upp í trettan kjakbólkar, soleiðis at lættari er at finna runt. Annars er sama støða galdandi á kvinna.fo, at ein kann skriva innlegg uttan at geva sín veruliga samleika til kennar. Hetta krevur sjálvandi, at kjakansarin fylgir væl við og reinsar út tey innlegg, ið antin eru ov óseriøs ella beinleiðis óndsinnað. Tað áhugaverda við hesum kjakinum er, at fleiri kvinnuevni verða tikin upp, ið annars plaga at liggja duld handan føroyska almenningin, so sum fosturtøka, hjúnaskilnaður, sex-leikur, síðuspring og fleyging. Hetta er møguliga besta frágreiðingin uppá hví kjakið er so væl vitjað. Tað hevur eyðsýnt verið ein risatørvur á einum kjaki, ið beinleiðis talar til kvinnurnar uttan fyrst at verða drigið gjøgnum ein moralskan sensur.

**www.kjaktorg.com/tjodveldi** Um man er áhugaður í politikki, er kjaktorgið hjá Tjóðveldisflokkinum helst eitt gott boð. Her verður kjakast um mangt og hvat, og kanska serliga um illsintar tjóðveldismenn. Sum í omanfyri nevndu kjakunum er vansin her, at ein ikki noyðist at avdúka sín samleika tá ein skrivar. Soleiðis hevur hetta kjakið mangan verið fylt við innleggum á sera lágum støði, har persónar eru vorðnir hunddálkaðir av sonevndum "huldufólkum", t.e. samleika- (og samvitsku-) leysum kjakarum, ið "haunta" kjakið við slatri og óhumsku av ymsum slagi. Hetta er satt eitur fyri eitt kjak, og er tískil alneyðugt, at kjakansarin er skjótur at sletta innlegg, ið eru ov harðrend. Eisini Sjálvstýrisflokkurin hevur eitt kjakforum á heimasíðuni.

**www.nordlysid.fo** Eisini finnast meiri lokal kjakforum. M.a. hevur Leirvíkar kommuna eitt kjakforum, har eitt tað mest týðandi kjakið hevur verið um ferðslutrupulleikan, ið stendst av komandi Norðoyatunlinum. Á hesum kjakinum er neyðugt at skráseta seg, men ikki neyðugt at skráseta sín veruliga samleika. Á heimasíðuni hjá Norðlýsinum er eisini eitt kjak, ið mest av øllum snýr seg um lokal viðurskifti. Heldur ikki her noyðist man at avdúka sín samleika. Men av tí at støðið á kjakinum kom niður á eitt alt ov lágt støði, tók blaðstjórin á Norðlýsinum ta avgerð at tilskila sær rætt at sensurera tey vánaligastu innleggini. Tó hevur man framvegis møguleikan at skriva beinleiðis inn í kjakið, um man skrásetur sín samleika.

**www.pop.fo** Um einki krav er um samleikaskráseting, tá er sum sagt lætt hjá einum kjaki at fara av sporinum og gerast óseriøst. Hinvegin skapa dulnevnd kjakforum møguleikan fyri at einstaklingar, ið annars ikki høvdu tikið blaðið frá munninum, seta seg við telduna og skriva um skeivleikar og órættvísur í samfelagnum. T.d. hevði neyvan nakar torað at kjakast um dildoir og kynsligar "preferansur", um ikki man slapp undan at avdúka sín samleika. Eisini kann vera ringt hjá einum kjakforumi at yvirliva um ikki fólk sleppa at vera dulnevnd. Kjakið á pop.fo - eitt kjak um tónleik og tónleikarar - er eitt dømi um eitt vælriggandi millumting. Á pop.fo er ikki neyðugt at skráseta sín sanna samleika. Men hinvegin er neyðugt við einum brúkaranavni. Um ikki tú hevur eitt brúkaranavn, so verður tú noyddur at skráseta teg sum brúkara, har tú noyðist at uppgeva eina teldupostadressu, soleiðis at í minsta lagi kjakansarin kennir tín samleika. Fyri almenningin kanst tú velja at kalla teg "Elvis", "Ozzy" ella hvat tú vilt.

**www.kjak.fo** Tað kanska mest framkomna almenna føroyska kjakforumið er kjak.fo. Hetta er eitt dygdarkjak, ið hevur nógvar tøkniligar møguleikar sum privat boð, foto-album, leitiskipan og kjattrúm. Tó, skalt tú kunna gagnnýta hesar møguleikar er aftur neyðugt at skráseta teg sum brúkara. Tú kanst sjálvandi skriva innlegg inn uttan nakra samleikaváttan. Men tá stendur ein av kjakansarunum (her eita teir "kjakleiðarar") og ansar eftir at dygdin er nóg góð. Tað serliga við kjak.fo er, at tað í grundini finnast fýra "tignir" av kjakarum. Fyrst eru tað administratorarnir, ið "eiga" kjakið og røkja tað tekniska og annars hava rætt at sletta/broyta øll innlegg á kjakforuminum. Síðani eru tað kjakleiðararnir, ið stýra kjakinum og hava rætt til at sletta/broyta øll innlegg í tí kjakrúmi teir eru settir at ambæta. Trið eru skrásettu brúkararnir, ið kunnu sletta/broyta síni egnu innlegg. At enda eru tað tey tilvildarligu vitjandi, ið vanliga bara skriva eitt ella tvey innlegg áðrenn tey fara víðari. Á kjak.fo verður serliga kjakast um átrúnað, politikk og tónleik. Men møguleikar eru at kjakast um alt millum himmal og hørð - undir skipaðum umstøðum.

## Niðurstøða

At kjakast á netinum er eitt sera áhugavert fyribrigdi. Tey kjakforumini, ið eg havi ummælt í hesi greinini eru einans tey, ið aktuelt eru mest vitjaði, og tískil áhugaverdast. Men stórur munur er á ymisku kjakforumunum, og hvar man velur at kjakast er ein spurningur um minst trý ting: 1) Hvat ynskir man at kjakast um? 2) Hvussu seriøst ynskir man at kjakast? 3) Ynskir man kjakast dulnevndur, ella ynskir man at kjakast saman við veruligum fólkum.

Serliga hetta síðsta er ein áhugaverdur spurningur. Tann sjálvsagdi fyrimunurin, ið er við dulnevndum kjakinnleggum, nevniliga at fólk tora at kjakast um ting tey annars ikki høvdu torað at lagt navn til, verður í ávísan mun uppvigaður av meiri sakleika í teimum kjakunum, har kjakararnir eru meiri ella minni kendir. Um kjakararnir eru kendir, er neyðugt at duga ein nøkulunda kjaksið, tí annars tímir eingin at kjakast við teg í longdini... nakað ein kundi kallað "Bigga-syndromið". Ella verri enn... tú kanst verða útblakaður og møguliga eisini settur í karantenu av kjakansaranum.

Líkasum tað at kjakast er ymiskt alt eftir um tú kjakast óformelt sum við náttúrðaborðið ella formelt sum á tingsins røðarapalli, líka so ymiskt er tað at kjakast á netinum. Sumt kjak er meiri at líkna við leysaprát, og leggur seg tætt uppat kjattfyribrigdinum í stíli, men er mest at meta sum "statements"; "virtuelt grafitti", og ikki sum veruligt kjak. Annað kjak er meiri seriøst og verður meiri at líkna einum politiskum kjaki. Fyri at hetta seinna skal kunna eyðnast tykist tó vera neyðugt við onkrum slagi av kjaksamleika. Tað er sera ringt at fáa í lag eitt dygdargott t.d. politiskt kjak, um kjakforumið íður av "huldufólki", soleiðis at ein ongantíð kann vera vísur í hvør er, ið svarar aftur. Hinvegin kann kjak á netinum vera sera seriøst og uppbyggiligt, um rætt verður atborið. At kjakast við fólk, ið veruliga hava áhuga í at kjakast um ávís evni, kann í summum førum gerast ein háttur at læra um fyribrigdi ein annars ikki vildi havt møguleikan at kjakast um í einum gerandis fólksligum almenningi. Gjøgnum netið er knappliga gjørligt at koma í samband við fólk, ið hava nógv meiri til felags við teg sjálvan enn tey, ið tú ert tvungin at vera saman við í bygdini ella í grannalagnum.

At kjakast á netinum kann í besta føri gerast ein háttur at læra um nøkur ting, ið annars eru sera tabukend í "veruliga" almenninginum. Í virtuella almenninginum kunnu tabu um alt frá kynslívi, blokkstuðli og átrúnaði verða beind av vegnum. Í virtuella almennininum sleppur hvør at siga sína meining, í hvussu er til eitt víst. Sum eg havi víst á í hesi greinini kann hetta eisini hava óhepnar avleiðingar sum t.d. í døminum um kjakforumið hjá Zip, ið sum nevnt onkuntíð er vorðið nýtt til happing av ósekum fólki. Men samanlagt mugu fyrimunirnir av at kunna kjakast á netinum sigast at vera nógv størri enn vansarnir.